# Parkinson á BBC Prime

**-Sum ungur vildi hann gerast kriket-stjørna, men tíbetur, fyri okkum, broytti hann meining.**

Undirhaldssendingin Parkinson er fastur táttur í fleiri húsarhaldum í hyggjarafjøldini hjá BBC. Her er prát við kendu andlitini úr filmsheiminum, tónleikaheiminum og undirhaldsvinnuni í miðdeplinum. Veruliga høvuðsnavnið í sendingini er Michael Parkinson.
Í 1971 byrjaði hann við prát- og undirhaldssendingini Parkinson á BBC, sum koyrdi yvir sjey ár. Flestu gestirnir eru frá undirhaldsheiminum, m.a. Muhammad Ali, John Lennon og Anna Prinsessa hava verið gestir hjá Parkinson. Í 1998 byrjaði Parkinson aftur á BBC og síðan hava størstu stjørnurnar úr undirhaldsheiminum lagt túrin framvið.
Sendingin Parkinson er tó als ikki hansara einasta verk. Fleiri bøkur og aðra sjónvarpssendingar hevur hann gjørt, annars hevur hann arbeitt sum blaðmaður og útvarpsmaður serliga fyri BBC.

## Ítróttur og Parkinson

Michael Parkinson er føddur í 1935 í Cudworth, tætt við býin Barnsley í Onglandi. Sum ungur hevði hann tveir yrkisdreymar, sum vóru ikki at fylgja í fótasporinum hjá pápa sínum sum minuarbeiðari og at spæla kriket fyri sítt elskaða Yorkshire-lið.
Uppvaksin í eini ítróttaelskandi familju hevur hann stóran áhuga fyri ítrótti. Og í hansara yrkislívi, er Parkinson eisini ein høgt virdur ítróttablaðmaður. Í 1965 byrjaði hann at skriva ein fastan ítróttateig í The Sunday Times. Herav eru fleiri komnar út í bók, t.d. "Football Draft", "Cricket Mad", "Best - an Intimate Biography" um George Best. Í hesum bókunum hevur hann sítt serliga skemtiliga ískoyti. Seinastu bøkurnar hann hevur skrivað eru: "Parkinson on Football", "Parkinson on Cricket" og "Parkinson on Golf". At hann hevur skrivað síðstnevndu bókina er eitt dømi um hvussu fjølbroyttur persónurin Michael Parkinson er, tí, tá hann var um 20 ár, stovnaði hann felagið Anti-Golf Society. So, í 40 ára aldrinum fekk kona hansara, Mary Parkinson, broytt hansara meining. Hann hevur leikt golf saman við Nick Faldo og enntá eisini Gary Linekar, hetta kann ein lesa meiri um í hansara bók.
Eftir at teir á BBC fingu lokkað hann at uppafturtaka Parkinson sendingina í 1998, hava fleiri álvarsligar, skemtiligar og minniligar løtur verið. Kendu andlitini, ið støkka inná gólvið hjá Parkinson hava mangt og hvat uppá hjartað. Ofta er tað at upplýsa um seinasta filmin sum tey eru í ella hevur vitjanin samband við onkran meiri álvarsligan tilburð. M.a. var poppstjørnan George Michael gestur í sendingini og greiddi frá sínum lívi. Hetta var stutt eftir gøluna, har hann bleiv handtikin fyri ósømiligan atburð á einum almennum staði. Tá skotski stórskemtarin Billy Connolly vitjaði, var dúgliga flent, men hetta var samstundis ein av teimum meiri álvarsomu prátunum, har nomið varð við ein sera torføran barndóm og rúsevnis-og rúsdrekkamisnýtsluna hjá Connolly. Fleiri av minniligum løtum við Parkinson er uttan iva í væntu á BBC Prime.

Komandi Parkinson sendingin, leygardagin 27. septembur, er ein sersending við Sir Michael Caine sum gesti. Her prátar Caine opið um sín loyniliga hálvbróðir, hansara arbeiðsstættar familju, um tá hann møtti bretsku drotningini og eisini avdúkar hann tað, ið liggur aftanfyri hansara, í Bretlandi, væl kendu vendingina: "...not a lot of people know that."









VARPIÐ